

Mynd: Sierra oil & Gas

# Lítil áhugi á at gera íløgur í oljuvirksemi í Meksiko-flógvanum

**Jógvan Hugo Gardar**

16.07.2015 - 18:38

Oljan.fo

Stjórnin í Meksiko hevur bjóða privatum íleggjarum at gera íløgur í oljuleiting, men áhugin er ikki stórur, skrivar Wall Street Journal.

Í meir enn 80 ár hevur oljuídnaðurin verið statligur í Meksiko, men nú hevur stjórnin latið dyrnar á glopp fyri privatum íleggjarum. Í gjár kundu privatir íleggjarar sleppa uppí part, men áhugin er ikki tann stóri, hóast stjórnin hevði vónað tað.

Myndugleikarnir bjóðaðu út 14 leitiøkir, men tað var bara áhugi fyri tveimum av teimum. Fyri stjórnina er tað eisini skuffandi at einki av teimum stóru oljufeløgunum sum ExxonMobil, Chevron ella Statoil hava víst áhuga, skrivar Financial Times.

Myndugleikarnir vita ikki hví áhugin er so lítil, men sambært Ivan Sandrea, stjóra hjá Sierra Oil & Gas, ið bjóðaði uppá eitt øki, so var prísurin sum myndugleikarnir høvdu sett ov høgur.